HARUVEIÐA

# Yvir 1.200 mans skutu harur í Føroyum í 2014



**Tilsamans skutu teir 9.400 harur á 1.123 túrum í 348 hagapørtum kring landið. Raskastir vóru vestmenningar. Hetta kann lesast í nýggju frágreiðingini: »Haruveiðan í Føroyum 2014 og annað tilfar um føroysku haruna«, sum júst er útkomin**

Eyðfinn Magnussen
*Biologur, Fróðskaparsetur Føroya*

Í frágreiðingini kanst tú lesa um, hvussu haruveiðan í 2014 hilnaðist kring landið. Teir, sum vóru raskastir at skjóta harur í Føroyum í 2014, vóru teir í 'Útihaganum á Bjørgum' í Vestmanna. Teir fingu 214 harur, sum teir skutu á 11 túrum. Teimum á baki koma teir í hagapartinum 'Norðurtriðingur, Norðaripartur' í Sørvági við 203 harum á 14 túrum. Teir í Neshaga í Vestmanna vóru beint aftanfyri Sørvingarnar við 202 harum, sum teir fingu á 14 túrum. Á fjórða plássi vóru teir í Sjeyndum í Tjørnuvík við 201 harum á 12 túrum.

Tað er sera ymiskt hvussu nógvar harur vórðu skotnar í teimum ymisku høgunum kring landið. Av teimum 334 sjálvstøðugu hagapørtunum, har skotið varð í 2014, varð helvtin av samlaðu veiðuni skotin í 47 hagapørtum. Av hesum, vórðu 25 %, tað eru 2.323 harur, skotnar í 16 hagapørtum, Tey fyrstu 25% av harunum, har teir fingu fægst harur, vórðu skotnar í 235 hagapørtunum.

## Vestmanna er harubygdin í Føroyum

Vestmanna er tann bygdin í Føroyum, har mest verður gjørt burtur úr haruskjóting. At áhugin fyri haruskjóting er stórur í Vestmanna, sæst eisini aftur á prísunum, sum hagarnir verða seldir fyri. Samlaði prísurin, sum haruhagarnir í Vestmanna eru seldir fyri, frá 1966 til í dag, er nú farin upp um 2.2 milliónir.

Hesin stóri áhugi, sum er fyri haruskjóting í Vestmanna, sæst eisini aftur á talinum á harum, sum verða skotnar, tí Vestmanna er tann bygdin, har nógv tær flestu harurnar vórðu skotnar, bæði í 2014, 2013 og í 2012. Tilsaman skutu vestmenningar í fjør 1.120 harur á 74 túrum í teimum 12 haruhøgunum, sum hoyra til bygdina. Hetta eru13% av øllum harunum, sum vóru skotnar í Føroyum í 2014. Av teimum 7 høgunum, har flestar harur vórðu skotnar Føroyum í 2014, vóru fýra teirra í Vestmanna. Næstflestar harur skutu teir í Miðvági; 553 harur á 70 túrum. Á triðja plássi er Sørvágur við 496 harum á 42 túrum, fjórða plássi er Sandavágur við 463 harum á 70 túrum.

## Veiðan dag fyri dag

Í kanningini er skrásetingin av haruveiðuni gjørd fyri hvønn einstakan dag, sum skotið hevur verið. Tí ber eisini til at gera upp, hvussu veiðan hevur hilnast dag fyri dag í veiðitíðin, og til ber at samanbera, hvussu veiðan hevur verið í mun til undanfarin ár.

Í 2014 var fyrsti dagur, har loyvt var at skjóta harur, mánadagin 3. november. Hendan dagin, vórðu tilsamans 1.100 harur skotnar í 75 hagapørtum kring landið. Samanbera vit haruveiðuna í 2014 við 2013 síggja vit, at munurin var serliga fyrsta dag, sum hilnaðist munandi betri í 2013 enn í 2014. Tær tríggjar seinastu vikurnar í 2014 vóru hinvegin, munandi betri í 2014 enn í 2013. Annars hevur gongdin verið hin sama tey bæði árini.

Í 2013 fall tað soleiðis, at fyrsti dagur, tá loyvt var at skjóta harur (2. november), var ein leygardag. Tá líkindini at skjóta harur eisini vóru framúr góð hendan dagin í 2013, vóru eisini nógvir harumenn í fjøllunum. Skotnar vórðu tá tilsamans 2.458 harur á 122 túrum kring landið. Í 2012 skutu teir 1.304 harur á 93 túrum tann fyrsta leygardagin í árinum, tá loyvt var at skjóta haru.




*Kanningin av haruveiðuni í Føroyum í 2014 var sera væl eydnað. Fyri 10 av teimum 15 oyggjunum, har møguleiki er at skjóta harur, eydnaðist tað at fáa upplýsingar úr øllum hagapørtunum, sum eru í oynni. Tilsamans eru upplýsingar fingnar fyri 348 av teimum íalt 454 hagapørtunum, sum eru í Føroyum. Ongar harur eru í Koltri, Stóru Dímun og Lítlu Dímun*

| Hagapartur | Bygd | Samlað tal av skotnum harum | Tal av túrum |
|---|---|---|---|
| 1. Úti í Haga á Bjørgum | Vestmanna | 214 | 11 |
| 2. Norðurtriðingur, Norðaripartur | Sørvágur | 203 | 14 |
| 3. Neshagi (Norðurnesið) | Vestmanna | 202 | 14 |
| 4. Sjeyndir (Norðan Kamb) | Tjørnuvík | 201 | 12 |
| 5. Dalhagi, Eystaripartur | Vestmanna | 156 | 4 |
| 6. Heimaraleiti | Miðvágur | 151 | 21 |
| 7. Brekkurnar | Vestmanna | 140 | 11 |
| 8. Fjallið (partur av Ognarhaganum) | Kvívík | 134 | 13 |
| 9. Uttanhús á Fjøllum | Miðvágur | 125 | 8 |
| 10. Yviri á Skarðhamri | Hvannasund | 121 | 5 |
| 11. Norðurtriðingur, Sun.partur (Vørðufelli) | Sørvágur | 120 | 9 |
| 12. Norðuri í Haga (Junkarahagi) | Kvívík | 117 | 10 |
| 13. Norðurhelvt (Fyri Norðan Á) | Eiði | 116 | 13 |
| 14. Fyri Heiman (í Gerðum) | Klaksvík | 103 | 12 |
| 15. Suðurtriðingur, Ytripartur | Sørvágur | 98 | 9 |
| 16. Skáltoftahagi | Skálatoftir | 97 | 4 |
| 17. Heimi í Haga á Bjørgum, Vestari | Vestmanna | 95 | 7 |
| 18. Norðan Á | Haldarsvík | 93 | 16 |
| 19. Dúvugarðarhagi, Heimanfyri Glyvur | Saksun | 91 | 9 |
| 20. Áarhagi, Miðrøktin | Kaldbak | 87 | 5 |
| **Samlað** | | **2.664** | **207** |

*Teir 20 hagapartarnar í Føroyum, har flestar harur vórðu skotnar í 2014. Eisini sæst hvussu nógvir túrar vórðu gjørdir í hesum hagapørtunum. Tær 2.664 harurnar, sum vórðu skotnar í hesum 20 hagapørtunum, svarar til 29 % av øllum harum, sum vórðu skotnar í Føroyum í 2014.*

leygardagin í árinum, tá loyvt var at skjóta haru.

## Flestu harurnar skotnar í Streymoynni

Kanningin vísir, at eins og í 2012 og 2013, so vóru eisini tær flestu harurnar í 2014 skotnar í Streymoynni; íalt 3.924 harur, sum svarar til eina slaka helvt av øllum harunum. Hetta er áleið sami brotpartur sum í 2013 og 2012, tá ávikavist 45% og 47% av teimum føroysku harunum vórðu skotnar í Streymoynni.

Í Vágum vórðu skotnar íalt 1.893 harur, 1.415 í Eysturoynni og 840 á Borðoynni. Til samanberingar fyri Vágoynna kann sigast, at bæði í 1991 og í 1997 vórðu umleið 1.400 haru skotnar tilsamans hvørt árið. Árið 2014 var tí eitt sindur yvir miðal til haru hjá vágamonnum.

Tað var eisini á Streymoynni, at flestu túrarnir vórðu gjørdir í 2014; íalt 388 túrar, sum svarar til 35% av samlaða túratalinum. Í 2013 vórðu 41% av øllum harutúrunum gjørdir í Streymoynni, í 2012, 45 %.

## Kanningin sera væleydnað

Kanningin av haruveiðuni í Føroyum í 2014 var sera væleydnað, og harumenn vóru avbera raskir at boða frá hvussu nógv teir høvdu fingið á teimum ymisku túrunum. Fyri 10 av teimum 15 oyggjunum, har møguleiki er at skjóta harur, eydnaðist tað at fáa upplýsingar um veiðuna í øllum høgunum í oynni. Talan er um oyggjarnar: Fugloy, Svínoy, Viðoy, Kunoy, Streymoy, Vágar, Mykines, Hestur, Nólsoy og Skúgvoy. Í Borðoynni manglar ein hagi, Innistovuhagi. Í Eysturoynni er 78% dekningur, meðan tað fyri Kalsoynna, Sandoynna og Suðuroynna mangla fleiri hagapartar.

Haruhagtølini, sum eru við í frágreiðingini, koma frá 366 ymiskum heimildarfólkum kring landið. Veiðitølini byggja í stóran mun á upplýsingar, sum eru fingnar frá harumonnum, sum hava boðað frá úrslitinum í Facebook-bólkinum »Haruskjóting í Føroyum«.

## 11. mars verður harukvøld í Vestmanna

Í sambandi við, at frágreiðingin *»Haruveiðan í Føroyum 2014 og annað tilfar um føroysku haruna«* nú er komin út, verður skipað fyri einum harukvøldi á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna . Tiltakið verður 11. mars kl. 20:00. Har fer Eyðfinn Magnussen á leggja úrslitini fram frá kanningini. Eyðfinn fer eisini at vísa nøkur úrslit um haruskjóting í Vestmanna og hvussu veiðan hevur hilnast í teimum ymisku hagunum tey seinru árini. Eisini ferð hann at vísa, hvat haruhagarnir í Vestmanna eru seldir fyri á uppboðssølu, líka frá 1966 til nú. Aftaná fara teir báðir Vestmeningarnir Jógvan Durhuus og Petur Højgaard, sum báðir nú eru búsitandi í Havn, at greiða frá haruskjóting í Vestmanna. Teir báðir hava í nógv ár skotið harur í Dølum. Í 2013 hevði Jógvan "gullbrúdleyp" sum harumaður. Hetta var hansara hálvtrýssinstjúgunda ár, har hann skeyt harur á Dølum, og hetta varð hátíðarhildin um kvøldið í húsinum, sum teir hava bygt í haganum.

## Frágreiðingin

Hetta er triðja royndin at gera eitt yvirlit yvir, hvussu nógvar harur verða skotnar í Føroyum. Fyrsta royndin varð gjørd í 2012. Frágreiðingin er heilar 75 síður til longdar, við nógvum tølum og øðrum tilfari um føroysku haruna. Umframt at greiða frá haruveiðuni í Føroyum í 2014 og hvussu nógv var skotið ymsastaðni kring landið, verður eisini í frágreiðingini greitt frá tíðarskeiðinum, tá loyvt er at skjóta harur í Føroyum og hvussu hetta tíðarskeiðið er broytt síðani 1881. Nøkur eldri harutøl eru eisini fingin til vega. Her sæst m.a., at 'Heimi í Haga' í Norðradali hava teir skotið tilsamans 2.871 harur árini 1976 til 2014. Eisini kann lesast, hvussu nógvar harur eru skotnar 'Skálatoftahaga' á Borðoynni árini 1970 til 2014. Ein kapittul eru um haruskjóting í Vestmanna og ein kapittul eru eisini um kaninir í Føroyum.

Aftast í frágreiðingini er listi, sum vísir úrslitini frá hvørjum einstøkum av teimum 1.123 harutúrunum, sum vórðu gingnir í 2014, skipaður eftir oyggj, bygd, hagaparti og dato. Frágreiðingin kann takast niður og lesast á leinkjuni:

http://setur.fo/uploads/tx_userpubrep/NVDrit2015_01_HaruveidanIFoeroyum2014.pdf




*Á myndin sæst, hvussu nógvar harur vórðu skotnar í tíggju teimum bestu bygdunum í Føroyum í 2014. Vestmenningar vóru bestir. Teir skutu 1.120 harur, sum teir fingu á 74 túrum. Næstir teimum vóru miðvingar við 553 harum á 70 túrum.*




*Á myndin sæst hvussu nógvar harur ( – ), sum vórðu skotnar hvønn dagin í veiðutíðini, 3. november til 31. desember, og hvussu nógvir túrar eru gjørdir teir einstøku dagarnar (- - - - - ). Úrslitið fyri 2014 (reyðu linjurnar) er samanborið við 2013 (bláu linjurnar).*




*Hóast tað í Føroyum er loyvt at skjóta haru einar 50 dagar um árið, so verður tó mest skotið leygardagar. Á myndin sæst, hvussu nógvar harur vórðu skotnar 12 ávísar dagar í 2014. Talan er um fyrsta dag, 7 fylgjandi leygardagar, triðja jóladag og teir tríggjar seinastu dagarnar, loyvt er at skjóta haru. Av teimum tilsamans 1.123 harutúrunum, har dato er givið, vórðu íalt 5.976 harur (74%) skotnar og 55% av túrunum gingnir hesar 12 dagarnar.*




*Myndin vísir, hvussu nógvar harur vórðu skotnar tilsamans í hvørjari oyggj í 2014 . Flestar harur vórðu skotnar á Streymoynni, tilsamans 3.924 harur, sum vórðu skotnar á 388 túrum. Í Vágum fingu teir 1.893 harur á 210 túrum, í Eysturoy 1.415 harur á 262 túrum.*